# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt samstarv við perspektivum

»Íslendskir spekulantar skulu ikki sleppa at keypa Grønland«. Soleiðis verður Aleqa Hammond, grøndlendska landsstýriskvinnan í uttanríkismálum endurgivin í Fréttablaðnum í Íslandi í morgun.

Hetta er sjónarmið, sum ikki eru ókend hjá okkum heldur. Men tað er spell, at hetta skal vera orsøkin til, at grønlendingar ikki vilja vera við í Hoyvíkarsáttmálanum - sum kundi ført til eitt risastórt fríhandilsøki í útnorði - óheft av bæði EFTA og ES.

Tað er sjálvandi av góðum grundum, at ES-málið ikki fær tað undirtøku í Føroyum, sum tað kundi fingið, um fiskivinnupolitikkurin hjá samveldinum ikki var so nógv í stríð við føroysk sjónarmið. Íslendingar gerast alsamt heitari talsmenn fyri limaskapi - Javnaðarflokkurin, sum júst hevur fingið sæti í stjórnini hjá Geir H. Haarde, forsætisráðharra, er heitur talsmaður fyri ES-limaskapi, meðan Sjálvstæðisflokkurin hjá forsætisráðharranum er ímóti. Kortini fræ ttist alsamt meira um, at yngru kreftirnar í flokki hansara eru fyri limaskapi. Tá Ísland søkir um limaskap í ES, fáa bæði føroyingar og grønlendingar nakað at hugsa um, men tað er rætt, sum Poul Michelsen, løgtingsmaður sigur í blaðnum í dag, at Hoyvíkarsáttmálin kann vera við til at menna okkum - eisini til at taka støðu til bæði EFTA og ES-limaskap, tá tað einaferð verður aktuelt.

Á fundinum hjá útnorðurráðnum vóru eisini umboð fyri Russland og Norðurnoreg við. Tað er sera áhugavert fyri okkum at fáa eitt samstarv tann vegin eisini - tí tað gevur sjálvsagt perspektiv, at lond við so nógvum felags áhugamálum - her serliga fiskivinnan - kunnu finna felags stev.

Hoyvíkarsáttmálin kann kanska vera grundarlagið fyri einum breiðum norðuratlantiskum samstarvsøki - fríhandilsøki ella fríhandilsfelagsskapi, sum serliga tekur fyrilit fyri okkara vinnumøguleikum - júst tað, sum ger tað so trupult hjá okkum at hugsa um limaskap í ES.

Jú, sanniliga kann útnorðursamstarvið bera ávøkst, tí er talan um samstarv við framtíðarperspektivum, sum vit eiga at hámetta.

**Sosialurin**

## Rætting til Dag og Viku fríggjadagin 15. juni 2007

*Bergur Lützen, stjóri*
*Sigfríður á Plógv Hansen, nenvdarformaður*

Í degi og viku fríggjakvøldið 15. juni 2007 var eitt innslag undir yvirskrivtini "Framíhjárættindi í Tórshavn".

Innslagið innihelt fleiri feilir, sum vit hervið vilja gera viðmerkingar til.

Í innslagnum varð róð uppundir, at fyritøka okkara, Viking Smíð, í samband við umbygging av Gamla Realskúlanum Viking Smíð fekk framíhjárætt til arbeiði. Grundgevingarnar fyri hesum uppáhaldinum hjá Sjónvarpinum var, at stjórin í Viking Smíð er sonur til tekniska stjóran hjá kommununi.

Eisini varð nevnt, at ein av eigarunum av Viking Smíð var Sp/F Geilin.

Fyrsta rættleiðingin er um eigaraviðurskiftini í Viking Smíð. Felagið hevur tveir eigarar, sum eru undirritaðu Bergur Lützen og Sigfríður á Plógv Hansen. Undirritaðu keyptu fyri meira enn einum ári síðani, hin 30. apríl í 2006, allan partapeningin í Viking Smíð, og eiga vit júst 50% hvør. Sp/F Geilin eigur einki sum helst í felagnum.

Næsta rættleiðingin er um leiðsluviðurskiftini í Viking Smíð. Undirritaðu hava eina partaeigaraavtalu um, at skiftast at vera stjóri uml. eitt ár í senn. Núverandi stjóri er Bergur Lützen, og ikki Sigfríður á Plágv Hansen. hetta kundi Sjónvarpið havt fingið at vita, við bert at ringja til annan okkara.

Triðja rættleiðingin er um innihaldið í innslagnum. Fyri okkum byrjaði málið við at vit í Útvarpinum hin 9. mars 2007 fræ ttu, at borgarstjórin í Havn hevði avgjørt at steingja Gamla Realskúlan, tí hann skuldi umvælast. Hin 12. mars 2007 blivu vit uppringdir av leiðaranum fyri Húsaumsitingina hjá kommununi, sum spurdi, um vit vóru sinnaðir at geva eitt tilboð upp á at klæða og bjálva Gamla Realskúlan. Eisini upplýsti hann, at arbeiði mátti byrja beinanvegin. Vit vóru áhugaðir og kundu byrja beinanvegin, og sendu tí leiðarunum fyri húsaumsitinginia eitt tilboð. Stutt eftir vendi hann aftur og boðaði frá, at tilboðið var góðtikið, og fóru vit síðani í gongd við arbeiðið fyri fullari orku.

Viking Smíð hevur ongantíð havt nakað samskifti við tekniska stjóran hjá Tórshavnar kommunu yvirhøvur um hetta mál.

Við tað at vit meta at umrøða Sjónvarpsins av Viking Smíð er til skaða fyri umdømi felagsins, og harvið eisini kann fáa týðandi fíggjarliga avleiðingar fyri felagið og fyri okkum eigarar persónliga, fara vit, vísandi til §36 og §37 í Fjølmiðlaábyrgdarlógini at krevja, at Sjónvarpið kemur við eini rættleiðing í Degi og Viku, sum er eins týðulig sum skeivu útsøgnirnar í innslagnum 15. juni. 2007.

## Hvør brendi gomlu gentukostdeildina í Hoydølum?

**CARL J. JENSEN**



Seinnapartin fríggjadagin ljóðaði, at eldur var í gomlu gentukostdeildini í Hoydølum. Nakrar tímar seinni um sjeytíðina gekk sjón fyri søgn. Kringvarpið vísti myndir frá ástaðnum. Har stóð hesin útivið fýrs ára gamli bygningurin og gálvaði upp í kvøldbláan, allur uppkolaður.

Tað var syndarligt at síggja.

Hvat tá.

Men fært tú ein kløkk, kanst tú meir enn so væntа tær ein hvøkk við. Og so var hesa ferð eisini. Ikki var seinasta glóðin kólnað í brunatoftini, so tóku yvirskriftir at birtast í fjølmiðlunum, ið róku framundir, at onkur hevði brent ta gomlu gentukostdeildina.

Á portalinum (hesum, sum tíðindablaðið Sosialurin røkir fyri tað almenna partafelagið Føroya-Tele) stóð m.a. henda yvirskrift at lesa fríggjakvøldið 15. juni:

**Gentukostdeildin brend í grund**

Einki spurnarmerki, bara henda kalda, ikki at siga øskukalda staðfestingin:

onkur hevði brent gomlu gentukostdeildina.

Síðani kom útvarpið við somu gitingum. Á vevsíðuni hjá ljóðvarpinum leygardagin 16. juni stóð t. d. eitt viðtal við studentaskúlarektaran. Eftir tekstinum at døma, sum avvarðandi hjá ljóðvarpinum høvdu skrivað, hýsti rektarin ongum iva, hvørki í sál ella hjarta:

Onkur hevði brent gentukostdeildina.

Við øðrum orðum gekk ein brennivargur leysur í Havn.

Tað var hvøkkur við lít.

Og eingin uggi var tað heldur, at orðini hjá rektaranum ikki sýntust at rína meiri enn so við tíðindafólkið hjá útvarpinum (ella hjá Sosialinum fyri alt tað), at viðkomandi ongar áneyðir helt vera at gera nakað burtur úr hesum ófræ ttum, men so at siga lat roykin fara við grindini. Størri tíðindi hava fyrr vikið fyri bólti og poppi í føroyskum fjølmiðlum.

Eftir vikuskiftið, og tíbetur, tað veit Guð, er lítið spurt aftur um brennivargin og óvist, um gamla gentukostdeildin í Hoydølum varð brend ella brann av øðrum ávum. Er tað hugsandi, spyrji eg meg sjálvan, at avvarðandi tíðindafólk høvdu aðrar atvoldir til gitingar sínar enn tað, sum sagt varð við tey? Kann eldsbrunin fríggjadagin hava sett ein støkk í hesi góðu skinn? Skotið teimum sovorðnan ótta í hjartað, at tey ongan eld torgaðu fyri sær um vikuskiftið, heldur ikki tann veika loga av málsligum tilviti, sum (um tað ikki er ov bjartskygt at ætla) helst anir í heysinum á teimum, ið hvussu er teir dagar, tá ið eldar gera minni um seg, enn teir gjørdu í Hoydølum fríggjadagin.

Spyrst so livst.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.